# Skifta KT-veitara í næstu viku

**PENINGASTOVNAR** Avtalan, sum føroysku peningastovnarnir gjørdu fyri einum ári síðani við Skandinavisk Data Center um heildarveiting av KT-skipanum, verður nú sett í gildi



Eirikur Lindenskov

- Arbeiðið at fyriskipa umleggingina er nú komið so væl áleiðis, at høvuðsumleggingin fer fram vikuskiftið 7. til 10. mai. Tað siga peningar í tíðindaskrivi í morgun.

Hetta skiftið merkir stórar innanhýsis umleggingar í peningastovnunum, men eisini nakrar av KTtænastunum hjá peningstovnunum verða broyttar.

Í umleggingarvikuskiftinum virka øll gjaldskort sum vanligt í handlum og aðrastaðni, har gjaldskort verða nýtt, bæði innanlands, uttanlands og á internetinum. Tó verður ikki møguligt at taka pening út í sjálvtøkunum vikuskiftið 7. – 10. mai.

Netbankaskipanirnar og telefontænastan í øllum peningastovnunum verða óvirknar frá fríggjakvøldinum 7. mai til mánamorgunin í 10. mai. Ráðiligt er tí, at fólk, ið hava tørv á hesum tænastum um vikuskiftið, avgreiða síni viðurskifti áðrenn fríggjakvøldið 7. mai, klokkan 16, siga peningastovnarnir

Uttanlandsflytingar verða ikki gjørdar í tíðarskeiðnum 5. mai – 10. mai.

- Vit hava miðað ímóti, at kundarnir verða órógvaðir minst møguligt av umleggingini. Kundin hevur sama kontunummar, somu kort og sama kundaráðgeva sum áður. Eisini skulu netbankakundar framhaldandi nýta sítt brúkaranummar og loynital at rita inn fyrstu ferð, og fáa síðani leiðbeining í at áseta eitt nýtt loyniorð, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, sum eisini er formaður í Felagnum Føroyskir Peningastovnar.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Tvífaldur ivi um málsøki

**BRÚKARAMÁL** Er brúkaraklagunevndarøkið yvirtikið sum føroyskt málsøki, ella er tað framvegis danskt, og hvør umsitur tað, um so er, at tað er yvirtikið?

Árni Joensen

Hesir báðir spurningarnir hava verið uppi og vent, nú Løgtingsins rættarnevnd hevur viðgjørt eitt uppskot til samtyktar frá Tjóðveldi um at seta á stovn brúkarakærunevnd.

Í álitinum, sum rættarnevndin legði fram fyrradagin, stendur, at nevndin hevur havt fund við Johan Dahl, landsstýrismann í vinnumálum, og at hann hevur greitt nevndini frá, at eitt ávíst samskifti er í løtuni millum føroyskar og danskar myndugleikar um, hvørt málsøkið er yvirtikið ella ikki. Lagt verður afturat, at Føroyar hava boðað donsku myndugleikunum frá, at føroyingar meta málsøkið sum yvirtikið.

Undir viðgerðini hevur rættarnevndin eisini havt fund við Anniku Olsen, landsstýrismann í innlendismálum. Í álitinum hjá minnilutanum sæst, at landsstýrismaðurin í innlendismálum vil hava greiði á, hvør umsitur málsøkið. Tað vil meirilutin í rættarnevndini eisini, tí í álitinum vil hann hava løgmann at fáa greiði á málsøkjabýtinum.

Meirilutin í rættarnevndini, samgonguumboðini Alfred Olsen, Gerhard Lognberg, Hans Pauli Strøm, Poul Michelsen, Annfinn Kalsberg, mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið hjá Tjóðveldi, meðan minnilutin, tjóðveldisumboðini Heine O. Heinesen og Bjørt Samuelsen, mælir Tinginum til at samtykja tað.

*arni@sosialurin.fo*




**HYUNDAI SONATA 2.4** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MD 028 **Km:** 64.000
**Árgangur:** apríl 2006
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 2.493 (5 ár)
**kr. 158.000,-**



**NISSAN PATROL 3.0** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JT 530 **Km:** 98.000
**Árgangur:** juli 2001
**Útgjald:** 60.000 **Mðr. gjald:** 3.516 (1,5 ár)
**kr. 115.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.4 D-4D LUNA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RJ 190 **Km:** 55.000
**Árgangur:** nov. 2005
**Útgjald:** 33.750 **Mðr. gjald:** 2.133 (5 ár)
**kr. 135.000,-**



**TOYOTA HIACE 2.5 STUTTUR** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TB 516 **Km:** 30.000
**Árgangur:** des. 2006
**Útgjald:** 44.500 **Mðr. gjald:** 2.805 (5 ár)
**kr. 178.000,-**



**SUZUKI GRAND VITARA 1.6** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HS 793 **Km:** 52.000
**Árgangur:** juni 2006
**Útgjald:** 32.500 **Mðr. gjald:** 2.041 (5 ár)
**kr. 130.000,-**



**VW CADDY 1.9 TDI DIESEL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** ME 283 **Km:** 47.000
**Árgangur:** apríl 2007
**Útgjald:** 37.000 **Mðr. gjald:** 2.338 (5 ár)
**kr. 148.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA SED.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FM 366 **Km:** 58.000
**Árgangur:** jan. 2003
**Útgjald:** 23.750 **Mðr. gjald:** 2.353 (3 ár)
**kr. 95.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 TERRA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MA 614 **Km:** 73.000
**Árgangur:** mai 2006
**Útgjald:** 28.500 **Mðr. gjald:** 1.817 (5 ár)
**kr. 114 .000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RU 338 **Km:** 40.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 2.495 (5 ár)
**kr. 158.000,-**



**SUBARU FORRESTER 2.0** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VH 954 **Km:** 50.000
**Árgangur:** nov. 2006
**Útgjald:** 48.750 **Mðr. gjald:** 2.941 (5 ár)
**kr. 195.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo